# SOSIALURIN er har tað hendir

2000 2000 -ver við frá byrjan!

HALD SOSIALIN WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

**ÓKEYPIS**
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

| |
|---|
| Navn: |
| Búst.: |
| Postnr., bygd, býur |
| Tlf.: |
| Undirskrift: |

☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.


Toll- og Skattstova Føroya, Eysturoyar øki

## Størv á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar øki verður søkt eftir skrivstovufólki at byrja 1. februar 2000 ella so skjótt til ber.

**2 føst størv:** Til útgangandi eftirlitsarbeiði innan toll, mvg, skatt o.a.

**Førleikakrøv:** Tann, sum settur verður, skal helst hava HH-útbúgving ella líknandi útbúgving, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera fyrikomandi, og hava góð samstarvsevni.

Setanarviðurskiftir: Løn og setanarviðurskiftir eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**1 avloysarastarv fyri starvsfólk í farloyvi fram til 01.09.2000:**
Til tollavgreiðslu, bóking o.a.

**Førleikakrøv:** Tann, sum settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving ella royndir innan skrivstovuarbeiði, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera fyrkomandi, og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskiftir:** Løn og setunarviðurskiftir eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir:** Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um starvsroyndir skula sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar øki, Postboks 225, 600 Saltangará **innan 28. januar 2000.**

---

**Um Stovnin**
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær sjey økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og tvær í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 16 fólk.

## Hús til sølu

Um nóg høgt boð fæst, verða sethúsini á Hetlandsvegi 6, Tórshavn lýst til sølu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

## Felagsinnskriving
### í Tórshavnar kommunalu skúlar skúlaárið 2000/2001

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1993 í 1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum, Hoyvíkar skúla ella Kaldbaks skúla næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 24. ella 25. januar 2000.

**Innskrivingin**
Innskrivingin í allar skúlarnar er í býráðssalinum **mánadagin 24. og týsdagin 25. januar, báðar dagarnar frá kl. 3-6 seinnapartin. Havið dóps/navnabræv við.**

Skúlaráðið skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísar skúlar í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúlar, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
Møguleiki er eisini at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 317160

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum. Skúlaráðið fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Argja skúli og Hoyvíkar skúli**
Næmingarnir á Argjum fara í skúla kl. 11.40, men kunnu fara í Frítíðarskúlan fyrrapart. Í Hoyvíkar skúla fara tveir flokkar í skúla fyrrapart. Flokkurin við næmingum, sum búgva Millum Gilja, fer í skúla kl. 11.50, men teir kunnu fara í Frítíðarskúla fyrrapart.

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 317845.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, verða **ikki** innskrivað í býráðssalinum, men umsóknarbløð til Frítíðarskúlan fáast á í býráðssalinum, heimasíðu komununnar (www.torshavn.fo), á býráðsskrivstovuni ella á tlf. 315160.

**Meir fæst at vita**
Meir fæst at vita um innskrivingina í skúlunum ella hjá Tórshavnar skúlaráði, Jákupi Simonsen, skrivara, tlf. 315160.

Tórshavnar skúlaráð


## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

*Lýsið í* **sosialinum**




## Íbúð/Kamar søkist

Søkt verður eftir lítlari íbúð/kamari fyri eitt av starvsfólkum okkara sum skjótast.

Alt hevur áhuga.

Hotel Føroyar ★★★★ Best Western
**Tlf. 317500**


**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**
ADC


**Til reiðar at gevast við roykingini?**
**Er stundin komin til tín?**

Eftir sjey viðtalur sleppir tú av við tubakkið!

**Dagar:**
24. og 31. jan.,
07., 09., 14. og 21. feb.
og 06. mars.
Kl. 18.00 (1-1 1/2 tíma)

**Kostnaður:**
Kr. 500,00 + MVG
(íroknað tilfar).

**Vegleiðari:**
Lynn Reveal, M. A.

**Stað:**
Dungagøta 6, Tórshavn

**Tilmelding:**
Ring tel. 319581
ella 316655

Sosialurin - 311820




**GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR. NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI**

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo


# Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella allar tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

| | | |
|---|---|---|
| **Eind 1:** | **Heilsufrøðilig viðurskifti** | **31. jan., 1. og 2. febr. 2000** |
| **Eind 2:** | **HACCP** | **14., 15. og 16. febr. 2000** |
| **Eind 3:** | **Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum** | **28. og 29. febr. og 1. mars 2000** |

**Málbólkur:** Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk, ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

**Undirvísarar:** Serfrøðingar í innaneftirliti.

**Stað:** Hotel Føroyar í Havn, allar dagar kl. 9.00-17.00.

**Skeiðkostnaður:** Kr. 3.000 fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum)

**Próvtøka:** Skipað verður fyri próvtøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið.

Frálæran fevnir m.a. um:
Smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvið, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.
Freistin at boða frá luttøku er **19. januar 2000.** Tilmelding fer fram við at ringja til Fiskivinnuskúlan á tlf. 424573, ella um teldupost: fiskvest@fiskvest.fo. Til ber eisini at senda ella faxa okkum innskrivingarseðilin niðanfyri. **Tilmelding er bindandi.** Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 424573 - Fax 424428

**Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti**
**Eind 1:** ____ Set kross **Eind 2:** ____ Set kross **Eind 3:** ____ Set kross

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |

*Ferðaráð Føroya*

# Ferðavinnustjóri

Vinnumálastýrið sóknast eftir stjóra til Ferðaráð Føroya.
Starvið verður at seta sum skjótast.

**Starvið**
Stjórin fyri Ferðaráðnum hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av stovninum sambært løgtingslóg um Ferðaráð Føroya. Stjórin vísir til stýrið fyri Ferðaráðið. Ferðaráðið er sett av Vinnumálastýriðnum. Endamál stovnsins er at menna føroysku ferðavinnuna.

**Høvuðsuppgávur**
- Ætlanir fyri menning av ferðavinnuni í Føroyum.
- Marknaðarføring av Føroyum sum ferðamannaland og tí, ið ferðavinnan kann bjóða.
- Menning av Føroyum sum ferðamannaland, herundir menning av ferðatilboðum, góðskumenning, útbúgving v.m.
- Ráðgeving og samskifti við virkir, áhugafeløg og einstaklingar innan ferðavinnuna.
- Samstarv við stovnar og virkir innan ferðavinnuna í útheiminum.
- Skipanir og reglugerðir fyri ferðavinnuna.
- Skipan av dagligum rakstri og umsiting av stovninum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú lýkur hesi krøv:
- Hóskandi útbúgving.
- Vinnuroyndir, helst innan ferðavinnuna.
- Skapanarevni og megi til at fremja hugskot í verki.
- Áræði, arbeiðssemi, framfýsni og serstakliga góð samstarvsevni.
- Málsliga væl fyri í skrift og talu (føroykst, danskt og enskt).
- Innlit í prosjekt- og fíggjarstýring.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag. Starvið er áramálssett. Setanin umfatar Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til Petur Olivar í Hoyvík, styrisformann á tel. 44 83 99 ella tel. 21 93 99 ella Arna Poulsen, aðalstjóra á tel. 35 60 60.

**Umsókn**
Umsóknir skulu stílast til Vinnumálastýrið, og skulu tær vera vinnumálastýrinum í hendi í seinasta lagi 14. februar 2000. Merk brævbjálvan "Ferðavinnustjóri". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**VINNUMÁLASTÝRIÐ**
Postsmoga 377, FO-110 Tórshavn.
T-bræv:vms@vms.fo • www.vms.fo

www.sosialurin.fo